*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*



**Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?**
Skriva til sunneva@sosialurin.fo



*Uni Reinert Debess gevur í heyst út fløguna The Well saman við bólkinum hjá sær Crawling Blue Crawling Blue eru Uni Reinert Debess, Brandur Jacobsen, Eyðun Johannesen og Óli Olsen*

ein hevur mist okkurt, ella um ein uppdagar síður, sum ein ikki kennir av sær sjálvum ella av øðrum fólkum.

- Tað eru fleiri ting, sum eg sjálvur skrivi um. Tað er kanska serliga baklandið, ið inspirerar. Familjan, hendingar og upplivingar, sum eg eri farin ígjøgnum. Um eg havi mist okkurt, ella um tað eru onkur ting, sum eg gjarna vildi havt gjørt, men ikki gjørdi. So skrivi eg um tað.

**Menniskju eru fantastisk**

- Og so er tað eisini bara tann fantastiska náttúran og heimurin og menniskju! Menniskju eru simpulthen so fantastisk. Tey eru ymisk og inspirerandi; flyta seg so nógv í øllum, sum tey gera. Man finnur ikki eitt monotont menniskja. Tað er á lívi. Sjálvt har, sum litið hendir, hendir nógv. Tí hjá einum øðrum hendir ikki tað sama. Einki er líka; eingin ger nakað uppá sama máta. Til dømis tá man arbeiðir saman, eisini í tónleiki, er tað vanligt so, at øll hava hvør sínar tankar um, hvussu úrslitið skal vera. Kynstrið er at lova persóninum at hava tankagongdina. Lagið blívur kanska nakað heilt annað, enn tað skuldi. Men tað er tað feita við tí.

**Skal koyrast allan vegin**

Crawling Blue skulu spæla á einum norskum festivali/oljuráðstevnu nú seinni í mánaðinum har Hanus G. Johansen og Lena Andersen eisini skulu spæla. Umframt hetta hevur bólkurin ætlanir um at fara út at turnera, fara í holt við eina nýggja fløgu og skaffa sær ein manageara.

- Vit vilja koyra tað allan vegin. Tað slógu vit fast beinanvegin, tá vit stovnaðu bólkin, og tað er eisini tað, sum allir bólkalimirnir hava játtað, áðrenn teir eru komnir uppí bólkin.

- Tað er dumt at leggja orku í nakað, og at tað so ikki blívur til nakað. Vit bíða bara eftir at fáa fløguna ordiliga lidna, men inntil ta tíð, er alt á stand-by, gigs í útlondum og so framvegis, tí áðrenn man hevur nakað at vísa á, kann man ikki ordiliga nakað. Men vit hava fleiri kontaktir, bæði í Danmark og í Amerika, og fara at byrja at arbeiða við hesum kontaktunum nú í nærmastu framtíð.

**Hoyr tvey løg hjá Crawling Blue á myspace.com/crawlingblue og fylg annars við her í blaðnum í heyst, tá vit fara at ummæla »The Well«**